VINNUMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið

Tórshavn, tann 3. mars 2015
VMR j.nr.: 15/00009
Viðgjørt: SPS

Løgtingsmál nr. 105/2014: Uppskot til løgtingslóg um broyting í ársroknskaparlógini
(Víðkað gjøgnumgongd)

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í í ársroknskaparlógini
(Víðkað gjøgnumgongd)

§ 1

Í anordning nr. 1355 frá 9. desember 2007 om ikrafttræden for Færøerne af årsregnskabsloven, sum broytt við løgtingslóg nr. 18 frá 8. mai 2008, løgtingslóg nr. 72 frá 25. mai 2009, løgtingslóg nr. 69 frá 27. mai 2011 og løgtingslóg nr. 136 frá 11. desember 2013, verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 9, stk. 4, § 135 a, stk. 1, 2. pkt. og § 164, stk. 2 verður "§ 135, stk. 1, 2. pkt " broytt til: "§ 135, stk. 2"

2) § 10 a verður orðað soleiðis:
"**§ 10 a**. Um ársroknskapurin er grannskoðaður, skal tað í sambandi við leiðsluátekningina, sbr. § 9, verða upplýst, um aðalfundurin ella samsvarandi góðkenningarstovnur í eini fyritøku, sum lýkur treytirnar í § 135, stk. 2, hevur tikið avgerð um, at ársroknskapurin fyri komandi roknskaparár ikki skal grannskoðast."

3) § 135, stk. 1-3 verður strikað og í staðin verður sett:

"**§ 135.** Ein fyritøka, sum hevur skyldu at gera ársfrásøgn eftir reglunum fyri roknkaparflokk B, C ella D, skal lata ársroknskap og ein møguligan samtøkuroknskap grannskoða av einum ella fleiri grannskoðarum, sbr. tó stk. 2. Ein fyritøka, sum er fevnd av roknskaparflokki B, kann velja at lata grannskoðanina eftir 1. pkt. verða framda eftir váttanarstandardi fyri smærri fyritøkur, sbr. tó stk. 3 og 4, um fyritøkan fíggjarjavnadagin í tvey fylgjandi roknskaparár ikki fer upp um tvey av fylgjandi støddarmørkum:
1) Ein fíggjarjavna upp á 12 mió. kr.,
2) eina nettosølu upp á 24 mió. kr., og
3) miðaltal gjøgnum roknskaparárið av heiltíðarsettum starvsfólkum upp á 15.

Stk. 2. Ein fyritøka, sum er fevnd av roknskaparflokki B, kann lata vera við at lata ársroknskapin grannskoða, sbr. tó stk. 3 og 4, um fyritøkan fíggjarjavnadagin í tvey fylgjandi roknskaparár ikki fer upp um tvey av fylgjandi støddarmørkum:
1) Ein fíggjarjavna upp á 1 mió. kr.,
2) eina nettosølu upp á 2 mió. kr., og

3) miðaltal gjøgnum roknskaparárið av heiltíðarsettum starvsfólkum upp á 12.

Stk. 3. Ásetingin í stk. 1, 2. pkt. og undantakið í stk. 2. er ikki galdandi fyri vinnurekandi grunnar, sbr. § 3, stk. 1, nr. 3.

Stk. 4. Ásetingin í stk. 1, 2 pkt. og undantakið í stk. 2 eru ikki galdandi fyri fyritøkur, sum hava týðandi kapitalpartar í øðrum fyritøkum, og sum hava týðandi ávirkan á rakstrarligu ella fíggjarligu leiðsluna í einum ella fleiri av hesum fyritøkunum, um fyritøkan og tær fyritøkur, sum fyritøkan hevur kapitalpartar í og hevur týðandi ávirkan á, tilsamans fíggjarjavnadagin í tvey fylgjandi roknskaparár ikki fer upp um tvey av fylgjandi støddarmørkunum í ávikavist stk. 1, 3. pkt. og stk. 2. Útrokningareglurnar í § 110 verða nýttar samsvarandi upp á útrokningina eftir stk. 1."

Stk. 4-7 verða eftir hetta stk. 5-8.

4) Í § 135, stk. 4, sum verður stk. 5, verður "stk. 1, 2. pkt." broytt til: "stk. 2"

5) § 135, stk. 6, sum verður stk. 7, verður orðað soleiðis:
"*Stk. 7.* Undantakið í stk. 2 kann ikki verða nýtt av einari fyritøku, tá fyritøkan, ella tann, sum hevur avgerandi ávirkan á fyritøkuna, góðtekur uppskot til bót, ella sum liður í revsimáli verður dømdur fyri brot á vinnufelagslóggávuna, roknskaparlóggávuna ella skattalóggávuna. Ein fyritøka kann ikki nýta undantakið í stk. 2, tá ein atknýtt fyritøka góðtekur uppskot til bót, ella sum liður í revsimáli verður dømd fyri brot á vinnufelagalóggávuna, roknskaparlóggávuna ella skattalóggávuna. Í hesum førum skulu ársroknskapir hjá fyritøkuni grannskoðast tey fylgjandi 3 árini. Skráseting Føroya kann leingja tíðarskeiðið, har ársroknskapir skulu grannskoðast, við upp til 2 ár."

6) § 135, stk. 7, sum verður stk. 8, verður orðað soleiðis:
"*Stk. 8.* Um Skráseting Føroya við kanning av ársfrásøgnini sbrt. § 159 staðfestir feilir ella manglar í mun til vinnufelagslóggávuna ella roknskaparlóggávuna, kann Skráseting Føroya gera av, at fyritøkan ikki kann nýta undantakið í stk. 2 í verandi roknskaparári og tey 2 fylgjandi roknskaparárini. Skrásetingin kann tó altíð taka avgerð um, at undantakið ikki kann nýtast, um tað er veitt lán, sum er fevnt av forboðnum í vinnufelagslóggávuni um lán til vinnufelagsluttakarar ella leiðslu, og talan er um lán, sum til støddar ikki er lítið týðandi, ella afturvendandi brot á forboðið í vinnufelagslóggávuni. Skrásetingin kann samstundis taka avgerð um, at fyritøkan ikki kann nýta ásetingina í stk. 1, 2. pkt. Skráseting Føroya kann í serligum førum leingja tíðarskeiðið, har roknskapirnir hjá fyritøkuni skulu grannskoðast, við einum roknskaparári afturat. "

7) Í § 135 a, stk. 1, 1. pkt. verður "§ 135, stk. 5, 2. pkt." broytt til: "§ 135, stk. 6, 2. pkt."

8) Í § 161, nr. 3 verður "§ 135, stk. 6, 3. pkt. og stk. 7" broytt til: "§ 135, stk. 7, 3. pkt. og stk. 8"

§ 2

Stk. 1. Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2016.

Stk. 2. Fyritøkurnar kunnu nýta ásetingina í § 1, nr. 3 í hesi lóg um grannskoðan eftir einum váttanarstandardi fyri roknskaparár, sum eru byrjað áðrenn 1. januar 2016.

Kap. 1. Almennar viðmerkingar

1. Bakstøði

Í skrivi frá mai 2013 vendi Felagið Føroyskir Grannskoðarar sær til Vinnumálaráðið við tilmæli um, at ársroknskaparlógin verður broytt soleiðis, at ávís feløg í framtíðini hava møguleika fyri at velja eina sonevnda "víðkaða gjøgnumgongd" av ársroknskapinum, heldur enn eina fulla grannskoðan.

Víðkað gjøgnumgongd er, sagt á einfaldan hátt, ein tænasta, sum liggur millum at gjøgnumganga (review) og grannskoða ein ársroknskap.

Víst varð á, at altjóða og í grannalondunum hevur gongdin verið, at størri munur verður gjørdur viðvíkjandi krøvum, sum verða sett smáum og stórum fyritøkum við tað, at krøvini, sum verða sett stórum fyritøkum, eru herd munandi. Samstundis hevur gongdin seinnu árini eisini verið, at spurningurin um at lætta um umsitingarligu byrðarnar hjá smáum og minni fyritøkum er komin meira í brennidepilin.

Grundgevingin fyri tilmælinum var, at tað eisini í Føroyum kann tykjast órímiligt, at tað skal vera sami standardur, sum er galdandi fyri grannskoðan av eini stórari og eini lítlari fyritøku, og at mett verður, at henda nýggja tænasta bæði tekur atlit til at lætta um umsitingarligu byrðarnar hjá teimum smæstu fyritøkunum, og at samfelagið og brúkarar av roknskapunum framhaldandi kunnu hava álit á fíggjarligu kunningini frá fyritøkunum.

2. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við uppskotinum er at lætta um umstingarligu byrðurnar hjá vinnuni. Uppskotið hevur við sær einfaldari reglur fyri fyritøkurnar, og skal gera teimum tað lættari at lúka krøvini, sum tað almenna setur.

Skotið verður upp, at ávís feløg fáa møguleika fyri at velja eina sonevnda "víðkaða gjøgnumgongd" av ársroknskapinum, heldur enn eina fulla grannskoðan.

Eftir uppskotinum verður settur inn ein váttanarstandardur, sum er serliga tillagaður tørvinum á grannskoðan í smáum fyritøkum.

Galdandi grannskoðanarstandardir eru gjørdir serliga við grannskoðan av stórum og torgreiddum fyritøkum fyri eyga og eru tí ikki so nýtiligir til grannskoðan av smærri fyritøkum.

Tað er tí ynskiligt, at grannskoðanarskyldan hjá smærri fyritøkum verður gjørd einfaldari soleiðis, at tær kunnu velja at lata grannskoðanina verða framda eftir einum váttanarstandardi, sum í størri mun er tillagaður tørvinum hjá smærri fyritøkum og teirra roknskaparbrúkarum.

Váttanarstandardurin skal tryggja, at tey viðurkskifti, sum eru viðkomandi í smærri fyritøkum, verða eftirkannað, men at tað slepst undan eftirkanningum, sum ikki eru neyðugar í hesum fyritøkunum.

Váttanarstandardurin fyri smáar fyritøkur fer at byggja á *"Erhvervsstyrelsens erklæringsstandard for små virksomheder (Udvidet gennemgang af årsregnskaber)"*. Hesin byggir á útkast frá FSR (Foreningen af Statsautoriserede Revisorer).

Samstundis verður skotið upp, at heilt smáar haldfyritøkur kunnu velja grannskoðan frá soleiðis, at tær verða javnsettar við aðrar heilt smáar fyritøkur. Galdandi reglur um grannskoðanarskyldu fyri haldfyritøkur merkja í royndum, at tað er neyðugt heilt ella lutvíst at grannskoða dótturfyritøkurnar soleiðis, at hesar ikki fáa gagn av lættanum av at velja grannskoðan frá.

Eisini verður skotið upp, at formligu krøvini um upplýsingar, sum smærru fyritøkurnar skula lata í ársroknskapinum í sambandi við frával av grannskoðan, verða gjørd einfaldari. Uppskotið verður ikki mett at hava týdning fyri atgongdina hjá roknskaparbrúkarum um, hvørt ársroknskapurin hjá einari fyritøku er grannskoðaður ella ikki.

Uppskotið um váttanarstandard, um møguleikan hjá haldfyritøkum at velja grannskoðan frá og um einfaldan av upplýsingarskylduni í sambandi við grannskoðan fer at lætta um umstingarligu byrðarnar hjá vinnuni.

Grundað á støddina av føroyska samfelagnum verður tó mett, at mørkini fyri heilt at frávelja grannskoðan ávikavist at velja eina "víðkaða gjøgnumgongd" eiga at vera lægri enn í Danmark.

3. Uppskotið til broyting í ársroknskaparlógini

a) Einfaldan av grannskoðanarskylduni

Galdandi rættur
Ársroknsparlógin er uppbygd eftir sonevnda byggikubbamyndlinum, hareftir einstaka fyritøkan í sambandi við gerð av ársfrásøgn (ársroknskapi o.a.) hevur skyldu at fylgja einum regluverki, sum primert veldst um stødd á fyritøkuni.

Prinsippið í myndlinum er, at smáar fyritøkur skulu fylgja lutfalsliga fáum og generellum krøvum, meðan størri fyritøkur skulu fylgja fleiri og meira detaljeraðum krøvum. Í myndlinum eru 4 kubbar – roknskaparflokkar – sum verða nevndir roknskaparflokkar A, B, C og D.

Fyritøkurnar skulu lúka tvær av niðanfyristandandi trimum treytum í 2 ár á rað, áðrenn tey skifta flokk. Støddarmørkini eru hesi:

Flokkur	Fíggjarjavni	Nettosøla	Starvsfólk í miðal
A Einstalingafyritøkur (sum oftast smáar) við persónligari ábyrgd fyri skyldum fyritøkunnar, sum ikki hava skyldu at gera roknskap, men sum kunnu velja tað.			
B Smáar fyritøkur	36 mió. kr.	72 mió. kr.	50
C Miðalstórar fyritøkur	143 mió. kr.	286 mió. kr.	250
C	Oman fyri 143	Oman fyri 286	Oman fyri 250

Stórar fyritøkur	mió. kr.	mió. kr.	
D Børsskrásttar fyritøkur og landspartafeløg (reglurnar fyri landspartafeløg eru ikki settar í gildi enn)		Uttan mun til nettosølu	Uttan mun til tal á starvsfólki

Roknskaparflokkur A er galdandi fyri einstaklingafyritøkur o.a., ið ikki hava skyldu at lata ársfrásøgn, men sum sjálvboðið velja at lata eina slíka.

Roknskaparflokkur B er galdandi fyri smá parta- og smápartafeløg o.a., sum er størsti parturin av teimum fyritøkum, sum hava skyldu at lata ársfrásøgn eftir ársroknskaparlógini.

Tær meira detaljeraðu reglurnar í roknskaparflokki C galda fyri miðalstór og stór parta- og smápartafeløg o.a.

Tær mest umfatandi og detaljeraðu reglurnar í roknskaparflokki D galda fyri børsskrásettar fyritøkur og landspartafeløg.

Børsskrásettar fyritøkur eru altíð fevndar av teimum umfatandi reglunum í roknskaparflokki D uttan mun til stødd.

Í ársroknskaparlógini og vinnufelagslógini eru reglur fyri partafeløg hjá landinum (landspartafeløg) samsvarandi teimum reglum, sum galda fyri børsskrásett partafeløg. Heimild er í vinnufelagslógini, at landsstýrismaðurin í kunngerð setur hesar reglur í gildi. Settur er embætisbólkur, sum m. a. skal umhugsa, um og hvussu nevndu reglur kunnu verða settar í gildi.

Allar fyritøkur í roknskaparflokki B, C og D hava skyldu at gera ársfrásøgn uttan mun til, um fyritøkan hevur valt at velja grannskoðan frá. Ársfrásøgnin skal áteknast av leiðsluni í felagnum, sum við hesum stendur til svars fyri, at ársfrásøgnin lýkur lógarinnar krøv. Ársfrásøgnin skal sendast inn til Skráseting Føroya, sum almannakunnger hana.

Eftir galdandi reglum skulu fyritøkur í roknskaparflokki B, C og D lata ársroknskapin og ein møguligan samtøkuroknskap grannskoða av einum løggildum ella skrásettum grannskoðara.

Fyritøkur í roknskaparflokki B kunnu lata vera við at lata ársroknskapin grannskoða, um fyritøkan fíggjarjavnadagin í tvey fylgjandi roknskaparár ikki fer upp um tvey av fylgjandi støddarmørkum:

1) Ein fíggjarjavna upp á 0,75 mió. kr.,
2) eina nettosølu upp á 1,5 mió. kr. og
3) miðaltal gjøgnum roknskaparárið á heiltíðarsettum starvsfólkum upp á 12.

Reglurnar um frával av grannskoðan er ikki galdandi fyri vinnurekandi grunnar, og fyritøkur, sum hava týðandi kapitalpartar í øðrum fyritøkum, og sum hava týðandi ávirkan á rakstrarligu ella fíggjarligu leiðsluna í einum ella fleiri av hesum fyritøkunum, t.v.s. sonevndar haldfyritøkur.

Ein fyritøka verður mett at hava týðandi ávirkan, um fyritøkan og dótturfeløg saman hava 20 prosent ella meira av atkvøðurættinum.

Hevur fyritøkan ella einaeigarin av fyritøkuni góðkent uppskot um bót, ella hevur fingið dóm fyri at hava framt brot á vinnufelags-, roknskapar- ella skattalóggávuna, kann fyritøkan í eitt tíðarskeið ikki velja grannskoðan frá, eins og Skráseting Føroya kann áleggja einari fyritøku at verða grannskoðað, um tað í sambandi við kanning av ársfrásøgnini verður staðfest, at tað eru týðandi feilir og manglar í mun til vinnufelags- og roknskaparlóggávuna.

Brot á roknskaparreglur er ikki bert regulerað í ársroknskaparlógini. Eftir umstøðunum kunnu tað eisini verða ásetingar í revsilógini, sum kunnu verða nýttar, t.d. ásetingar um skuldarsvik ella fíggjarsvik. Eisini eru ásetingarnar í revsilógini viðkomandi í førum, har tað í ársroknskaparlógini er krav um váttan frá leiðsluni.

Innihaldið í uppskotinum
Eftir uppskotinum verður ársroknskaparlógin broytt soleiðis, at fyritøkur í roknskaparflokki B, sum eru fevndar av lógskyldugari grannskoðan, kunnnu velja at lata grannskoðanina verða framda eftir váttanarstandardi, sum er serliga tillagaður støddini á hesum fyritøkum, um fyritøkan fíggjarjavnadagin í tvey fylgjandi roknskaparár ikki fer upp um tvey av fylgjandi støddarmørkum:

1) Ein fíggjarjavna upp á 12 mió. kr.,
2) eina nettosølu upp á 24 mió. kr. og
3) miðaltal gjøgnum roknskaparárið á heiltíðarsettum starvsfólkum upp á 15.

Í Danmark kunnu allar fyritøkur í roknskaparflokki B, t.e. smáar fyritøkur (fíggjarjavni 36 mió. kr., nettosøla 72 mió. kr., starvsfólkatal 50) velja at nýta váttanarstandardin.

Ein grannskoðan skal í dag útinnast eftir 37 altjóða grannskoðanarstandardum, sum FSR – felagið hjá donskum grannskoðarum hevur umsett til danskt.

Grannskoðanarstandardir hava serliga grannskoðan av stórum fyritøkum fyri eyga, og eru tí ikki serliga nýtiligir til grannskoðan av smáum fyritøkum. Tað verða sostatt sett óneyðuga dýrkandi krøv til fyritøkurnar til grannskoðan av ársroknskapum.

Tí er tørvur á alternativum møguleikum at grannskoða ársroknskapir hjá smáum fyritøkum, sum í størri mun eru tillagaðir umstøðunum í hesum fyritøkunum, samstundis sum tørvurin hjá fyritøkunum og teirra roknskaparbrúkarum verður nøktaður.

Sum skjal 1 til kunngerð frá Erhvervsstyrelsen “Bekendtgørelse om godkendte revisorers erklæringer for små virksomheder (Udvidet gennemgang af årsregnsakaber)”, hevur Ervervsstyrelsen givið út: “Erhvervsstyrelsens erklæringsstandard for små virksomheder (Udvidet gennemgang af årsregnskaber)”. Hesin byggir á útkast frá FSR (Foreningen af Statsautoriserede Revisorer).

Verður grannskoðanin framd eftir hesum standardinum (tillagaður føroyskum viðurskiftum), sum er tillagaður viðurskiftunum í smáum fyritøkum, fær grannskoðarin nøktandi prógv til, at hann kann gera eina niðurstøðu um ársroknskapin við munandi minni arbeiðsorku o.a. enn við grannskoðan eftir galdandi grannskoðanarstandardum. Grannskoðan eftir váttanarstandardinum fer tískil at geva almenninginum trygd fyri, at ársroknskapirnir hjá fyritøkunum eru rættvísandi, tó ikki somu trygd, sum tá grannskoðað verður eftir grannskoðanarstandardunum.

Í lógaruppskotinum um broyting í grannskoðaralógini, sum samstundis verður lagt fyri Løgtingið, verður skotið upp at seta heimild í grannskoðaralógina at seta ein váttanarstandard í gildi við kunngerð.

Avgerð um at lata ársroknskapin grannskoða eftir váttanstandardinum verður tikin við virknað frameftir á vanligum aðalfundi ella samsvarandi fundi, har ársroknskapurin verður góðkendur. Grannskoðarin, sum er valdur til at grannskoða ársroknskapin, skal framvegis verða fráboðaður og skrásettur hjá Skráseting Føroya.

Eisini verður skotið upp, at fyritøkur, sum hava kapitalpartar í øðrum fyritøkum, og sum hava týðandi ávirkan á rakstrarligu ella fíggjarligu leiðsluna í einum ella fleiri av hesum fyritøkunum, skulu kunna lata grannskoðanina fremja eftir váttanstandardunum, tí mett verður, at grannskoðan eftir váttanarstandardinum veitir nóg góða trygd.

Samstundis verður skotið upp, at heilt smáar haldfyritøkur kunnu velja grannskoðan frá, um haldfyritøkur og tær fyritøkur, sum tær hava avgerandi ávirkan á, tilsamans ikki fara upp um støddarmørkini. Smáar fyritøkur, sum hava haldfyritøkur, og sum annars kundu valt grannskoðan frá, kunnu í royndum ofta ikki gera tað, tí grannskoðan av haldfyritøkuni krevur, at dótturfyritøkan heilt ella lutvíst eisini verður grannskoðað.

b) Hækkan av markinum fyri undantaki av grannskoðan

Fyritøkur í roknskaparflokki B kunnu lata vera við at lata ársroknskapin grannskoða, um fyritøkan fíggjarjavnadagin í tvey fylgjandi roknskaparár ikki fer upp um tvey av fylgjandi støddarmørkum:

1) Ein fíggjarjavna upp á 0,75 mió. kr.
2) Nettosølu upp á 1,5 mió. kr.
3) Miðaltal gjøgnum roknskaparárið á heiltíðarsettum starvsfólkum upp á 12.

Tá ársroknskaparlógin varð dagførd í 2007 áðrenn yvirtøkuna, við løgtingsmáli nr. 61/2006: Uppskot til ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar "årsregnskabsloven", varð skotið upp, at mørkini skuldu vera tey somu, sum tey tá vóru í Danmark, t.e. ávikavist ein javna upp á 1,5 mió kr., umsetning upp á 3 mió kr. og starvssett 12. Eftir tilmæli fra Løgtingsins Vinnunevnd varð samtykt, at mørkini skuldu lækkast soleiðis: javni upp á 0,75 mió kr., umsetningur upp á 1,5 mió kr., meðan starvssett skuldu vera tað sama, 12. Í álitinum frá Vinnunevndini varð hetta grundgivið soleiðis:

"Orsøkin til ynski um at broyta markið fyri fyritøkur, sum ikki skulu grannskoðast, við 50 % er, at um hetta verður gjøgnumført, er neyðugt við herdum eftirliti hjá skattamyndugleikunum og hjá Skráseting Føroya, og tað verður mett sum ein trupulleiki hjá tí føroysku umsitingini, og hevði tá verðið neyðugt við fleiri almennum starvssetanum til hetta eftirlit".

Í Danmark eru støddarmørkini síðani hækkað soleiðis: fíggjarjavni 4 mió. kr., nettosøla 8 mió. kr. og starvsfólkatal 12.

Skotið verður upp, at mørkini verða hækkað soleiðis:

1) Ein fíggjarjavna upp á 1 mió. kr.
2) eina nettosølu upp á 2 mió. kr.

Miðaltal gjøgnum roknskaparárið av heiltíðarsettum starvsfólkum verður tað sama.

c) Einfaldgering av upplýsingarskylduni í sambandi við frával av grannskoðan

Skotið verður upp, at upplýsing um frával frameftir bert skal latast í tí ársroknskaparárinum, tá tað verður tikin avgerð um frával, og ikki sum higartil eisini í ársroknskapunum fyri eftirfylgjandi ár.

Tað skal framvegis síggjast av viðtøkum felagins, at grannskoðan er vald frá, eins og tað skal fráboðast og skrásetast, at grannskoðarin er farin frá.

d) Broyting av ásetingunum, sum avmarka atgongdina til frával

Hava fyritøkur, sum hava valt grannskoðan frá, góðkent uppskot til bót, ella eru dømdar fyri brot á vinnufelagslóggávuna, roknskaparlóggávuna ella skattalóggávuna, kann Skráseting Føroya krevja, at ársroknskapurin verður grannskoðaður 2 tey fylgjandi árini.

Eftir uppskotinum kann Skráseting Føroya eisini krevja, at ársroknskapurin fyri verandi ár, tá brotið verður staðfest, verður grannskoðaður.

Eftir uppskotinum verður eisini veitt Skráseting Føroya heimild at krevja grannskoðan, tá Skráseting Føroya í sambandi við kanning av ársroknskapinum staðfestir feilir ella manglar við ársroknskapinum, og tá veitt eru ólóglig lán til vinnufelagsluttakarar ella leiðslu, og talan er um lán, sum til støddar ikki eru lítið týðandi, ella afturvendandi brot á forboðið í vinnufelagslóggávuni viðvíkjandi partaeigaralánum.

2. Ummæli
Uppskotið hevur verið til ummælis hjá Felagnum Føroyskir Grannskoðarar, Føroya Arbeiðsgevarafelag, Fíggjarmálaráðnum, TAKS og Grannskoðaraeftirlitinum.

Felagið Føroyskir Grannskoðarar og Grannskoðaraeftirliti høvdu nakrar lógartekniskar viðmerkingar, og er uppskotið rættað samsvarandi. Føroya Arbeiðsgevarafelag mælir til, at mørkini fyri, nær víðkað gjøgnumgongd kann verða nýtt, verða hækkað soleiðis, at tey verða helvtina av teimum mørkum, sum galdandi eru í Danmark. Í uppskotinum er valt at fylgja tilmælinum frá Felagnum Føroyskir Grannskoðarar

Kap. 2. Avleiðingar av uppskotinum

Fíggjarligar avleiðingar

A. Fyri landið
Uppskotið hevur ongar fíggjarligar avleiðingar fyri landið.

B. Fyri kommunurnar
Uppskotið hevur ongar fíggjarligar avleiðingar fyri kommunurnar.

C. Fyri vinnuna
Innsetan av váttanarstandardi sum alternativ til grannskoðan av ársroknskapum hjá fyritøkum í roknskaparbólki B varð, tá váttanarstandardurin varð settur inn í Danmark, mett at hava við sær lættar fyri vinnuna upp á 236 mió. kr. Útrokningin varð grundað á, at váttanarstandardurin fór at spara fyritøkuni í minsta lagi 25 % av kostnaðinum, samanborið við grannskoðan. Harumframt

varð mett, at frítøkan av grannnskoðan fyri heilt smáar haldfyritøkur fór at hava lættar við sær fyri vinnuna upp á 172 mió. kr. Tá varð mett, at nevndu tiltøk samlað høvdu lættar við sær fyri vinnuna upp á uml. 400 mió. kr.

Tað eru ikki gjørdar serligar útrokningar av fíggjarligu avleiðingunum fyri føroysku vinnuna av hesum tiltøkunum eftir uppskotinum. Føroysku støddarmørkini fyri frávali av grannskoðan og fyri nýtslu av váttanarstandardinum eru munandi lægri enn tey donsku. Verða donsku tølini nýtt uttan víðari, men við nevnda fyrvarni, hevur uppskotið, leysliga mett, havt við sær lættar fyri vinnuna upp á uml. 1-2 mió. kr. árliga.

Umsitingarligar avleiðingar
Uppskotið hevur ongar umsitingarligar avleiðingar.

Umhvørvisavleiðingar
Uppskotið hevur ongar umhvørvisavleiðingar.

Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur
Uppskotið hevur ongar avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur.

Sosialar avleiðingar
Uppskotið hevur ongar sosialar avleiðingar.

Talva 1: Yvirlit yvir avleiðingar

	Fyri landið/ landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss/øki í landinum	Fyri ávísar samfelagsbólkar/ felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar/ búskaparligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Ja
Umsitingarligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar				Nei	

Kap. 3. Serligar viðmerkingar

Til § 1, nr. 1
Talan er um fylgibroytingar orsakað av, at nýtt pkt. 2 verður sett inn í § 135, stk. 1.

Til § 1, nr. 2

Eftir galdandi áseting skal verða upplýst í ársroknskapinum, um felagið á aðalfundi hevur tikið avgerð um, at ársroknskapurin fyri komandi roknskaparár ikki skal grannskoðast. Upplýsingin skal gevast í ársroknskapinum bæði tað árið, tá aðalfundurin tekur avgerð um at velja grannskoðan frá, men eisini øll eftirfylgjandi roknskaparár.

Skotið verður upp, at ásetingin verður broytt soleiðis, at upplýsingin um, at grannskoðan av ársroknskapinum fyri komandi ár er vald frá, bert skal latast í tí ársroknskapinum, sum skal leggjast fram á vanliga aðalfundinum, har tað skal takast avgerð um at velja frá grannskoðan av komandi ársroknskapum.

Tað verður framvegis krav, at tað skal síggjast av felagsins viðtøkum, at grannskoðan er vald frá, eins og tað skal fráboðast til Skráseting Føroya, at grannskoðarin er farin frá.

Til § 1, nr. 3
Eftir galdandi reglum í § 135, stk. 1 í ársroknskaparlógini hava allar fyritøkur í roknskaparflokki B, C og D skyldu at lata ársroknskapin og ein møguligan samtøkuroknskap grannskoða av einum løggildum ella skrásettum grannskoðara.

Ein heilt lítil fyritøka kann velja grannskoðan frá, um fyritøkan fíggjarjavnadagin í tvey fylgjandi roknskaparár ikki fer upp um tvey av fylgjandi støddarmørkum: Ein fíggjarjavna upp á 0,75 mió. kr., eina nettosølu upp á 1,5 mió. kr. og miðaltal gjøgnum roknskaparárið av heiltíðarsettum starvsfólkum upp á 12.

Nýggja § 135, stk. 2 hevur við sær, at fyritøkur í roknskaparflokki B, sum hava skyldu at lata ársroknskapin grannskoða, kunnu velja at lata grannskoðanina verða framda eftir váttanarstandardi, sum er tillagaður smærri fyritøkum.

Fyri at ein fyritøka skal kunna velja at nýta váttanarstandardin, skal fyritøkan fíggjarjavnadagin í tvey fylgjandi roknskaparár ikki fara upp um tvey av fylgjandi støddarmørkum:

1) Ein fíggjarjavna upp á 12 mió. kr.
2) Eina nettosølu upp á 24 mió. kr.
3) Miðaltal gjøgnum roknskaparárið av heiltíðarsettum starvsfólkum upp á 15.

Váttanarstandardurin verður settur í gildi við kunngerð við heimild í grannskoðaralógini. Uppskot um hetta verður lagt fyri Løgtingið samstundis við hesum.

Hevur fyritøkan eftir serlóggávuni skyldu til at lata ársroknskapin grannskoða, kann fyritøkan ikki velja at lata ársroknskapin grannskoða eftir váttanarstandardinum, uttan so at tað í serlóggávuni er serlig heimild til tað.

Grannskoðan eftir váttanarstandardinum verður í byrjunarstøðu javnsett við grannskoðan eftir grannskoðanarstandardunum. Tá tað í ársroknskaparlógini, grannskoðaralógini, anordning om ikrafttræden for Færeøerne af lov om visse erhvervsdrivende virksomheder eru ásetingar um grannskoðan ella grannskoðaðan ársroknskap, fevna hesar ásetingar eisini um tær støður, har fyritøkan hevur valt at lata grannskoðanina fara fram eftir váttanarstandardinum uttan so, at annað er fyriskipað í ásetingini.

Tað merkir t.d., at fyritøkurnar framvegis skulu hava fráboðað og skrásett ein grannskoðara, sum lýkur krøvini í grannskoðaralógini. Hinvegin er tað í § 1, nr. 6 í uppskotinum til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um góðkendar grannskoðarar og

grannskoðanarvirkir ásett eitt ítøkiligt undantak soleiðis, at grannskoðarin ikki hevur skyldu at føra grannskoðaraprotokoll, um grannskoðanin er gjørd eftir váttanarstandardi sambært § 135, stk. 1, 2. pkt. í ársroknskaparlógini.

Uppskotið forðar ikki fyri, at ein fyritøka, sum hevur valt grannskoðan frá, velur at lata ársroknskapin grannskoða eftir váttanarstandardinum. Í hesum førum verður váttan eftir standardinum javnsett við aðrar váttanir við trygd. Tað merkir, at fyritøkan skal halda tey krøv, sum galda fyri fyritøkur, sum hava valt grannskoðan frá, um at broyta viðtøkurnar og frámelda grannkoðaran hjá Skráseting Føroya.

Fyritøkur, sum ikki hava valt grannskoðan frá, men kundu havt gjørt tað, kunnu velja at lata ársroknskapin grannskoða eftir váttanarstandardinum. Tá grannskoðan ikki er vald frá, skal fyritøkan framvegis hava fráboðað og skrásettan grannskoðara, sum lýkur krøvini í grannskoðaralógini.

Í § 135, stk. 3 verður ásetingin um, at vinnurekandi grunnar ikki kunnu velja grannskoðan frá, varðveitt. Samvarandi kunnu vinnurekandi grunnar ikki velja at lata ársroknskapin grannskoða eftir serliga váttanarstandardinum eftir § 135, stk. 1, pkt. 2. Bakstøðið fyri ikki at einfalda grannskoðaraskylduna fyri vinnurekandi grunnar hevur samband við serligu eigara- og eftirlitsviðurskiftini viðvíkjandi vinnurekandi grunnum.

Eftir § 135, stk. 4 kunnu fyritøkur, sum hava týðandi kapitalpartar í øðrum fyritøkum, og sum hava týðandi ávirkan á rakstrarligu ella fíggjarligu leiðsluna í einum ella fleiri av hesum fyritøkunum (sonevndar haldfyritøkur), lata grannskoðanina fara fram eftir serliga váttanarstandardinum eftir § 135, stk. 1, 2. pkt.

Heilt smáar haldfyritøkur kunnu harumframt heilt velja grannskoðan frá eins og heilt smáar fyritøkur í roknskaparflokki B.

Tað er ein treyt fyri at nýta váttanarstandardin, at haldfyritøkan og tær fyritøkur, sum fyritøkan hevur kapitalpartar í og hevur týðandi ávirkan á, tilsamans í 2 fylgjandi roknskaparár dagin fyri fíggjarjavna ikki fara upp um tvey av fylgjandi støddarmørkunum.

1) Ein fíggjarjavna upp á 12 mió. kr.
2) Nettosølu upp á 24 mió. kr.
3) Miðaltal gjøgnum roknskaparárið av heiltíðarsettum starvsfólkum upp á 15.

Samsvarandi er tað ein treyt, fyri at heilt smáar haldfyritøkur kunnu velja grannskoðan frá, at haldfyritøkan og tær fyritøkur, sum fyritøkan hevur kapitalpartar í og hevur týðandi ávirkan á, tilsamans í 2 fylgjandi roknskaparár dagin fyri fíggjarjavna ikki fara upp um tvey av fylgjandi støddarmørkunum:

1) Ein fíggjarjavna upp á 1 mió. kr.
2) eina nettosølu upp á 2 mió. kr., og
3) miðaltal gjøgnum roknskaparárið av heiltíðarsettum starvsfólkum upp á 12.

Til § 1, nr. 4
Talan er um fylgibroytingar orsakað av, at nýtt stk. 2 verður sett inn í 135.

Til § 1, nr. 5

Skotið verður upp, at § 135, stk. 7 verður tillagað soleiðis, at atlit verða tikin til samtøkuviðurskifti. Broytingin skal tryggja, at frítøka frá grannskoðaraskylduni ikki kann verða vald í teimum førum, har fysiskir ella løgfrøðilgir persónar, sum hava avgerandi ávirkan á fyritøkuna, hava brotið viðkomandi lóggávu.

Til 1, nr. 6

Eftir galdandi áseting í § 135, stk. 8 kann Skráseting Føroya gera av, at ein fyritøka ikki kann velja grannskoðan frá í tvey fylgjandi roknskaparár, um Skrásetingin í sambandi við roknskapareftirkannan staðfestir týðandi feilir ella manglar í mun til vinnufelagslóggávuna ella roknskaparlóggávuna. Er talan um greflig brot, kann Skrásetingin krevja grannskoðan í eitt ár afturat.

Eftir pkt. 1 í uppskotinum fær Skráseting Føroya heimild til at áleggja einari fyritøku grannskoðan longu í verandi ári í sambandi við eina roknskapareftirkanning, sum tað ikki er heimild til eftir galdandi áseting.

Tað hevur týdning í teimum førum, har Skrásetingin í sambandi við eina eftirkanning áleggur fyritøkuni at lata inn nýggja ársfrásøgn sbrt. § 160, nr. 3 í ársroknskaparlógini, tí eftirkannaða ársfrásøgnin hevur so nógvar feilir ella manglar, at hon ikki gevur eina rættvísandi mynd av fyritøkuni.

Ásetingin, sum verður skotin upp, viðvirkar til, at roknskaparbrúkararnir skjótast gjørligt fáa atgongd til eina rættvísandi ársfrásøgn.

Við týðandi feilir ella manglar er at skilja feilir, sum hava við sær, at ársfrásøgnin ikki gevur eina rættvísandi mynd av fyritøkuni, ella hava við sær týðandi brot á vinnufelagslóggávuna.

Eftir uppskotinum kann Skráseting Føroya altíð áleggja einari fyritøku grannskoðan, um fyritøkan hevur veitt ólógligt partaeigaralán, sum í støddd ikki er ótýðandi, ella um fyritøkan ferð eftir ferð hevur brotið forboðið í vinnufelgslóggávuni fyri partaeigaralánum.

Tað skal altíð áleggjast grannskoðan í teimum førum, har viðurskiftini kring ólógliga lánið merkja, at brotið verður meldað til løgregluna.

Eisini í øðrum førum kann tað eftir eini ítøkiligari meting verða álagt, at grannskoðan skal fara fram t.d. í førum, har fyritøkan hevur roynt at goyma ólógligu viðurskiftini, ella at lánið hevur staðið í fleiri ár. Tað kann eisini vera eftir einari konkretari meting av potentiella váðanum fyri tapi, sum felagið leggur á t.d. starvsfólk og kravánarar. Við í hesa metingina verður tikið t.d. lánsupphædd samanhildin við eginkapital hjá fyritøkuni og fíggjarligu viðurskifti, úrslit og gongd viðvíkjandi rakstarúrsliti hjá fyritøkuni, t.d. um fyritøkan í fleiri ár hevur havt undirskot.

Fyritøkur, sum verða álagdar grannskoðan, kunnu í byrjunarstøðu lata grannskoðanina fara fram eftir váttanarstandardinum. Eftir pkt. 3 kann Skráseting Føroya hinvegin taka avgerð um, at ein fyritøka ikki kann velja váttanarstandardin. Hendan avgerðin veldst um eina ítøkiliga meting av, um t.d. eigarin av fyritøkuni hevur roynt at goyma lánið. Í tílíkum førum kann verða neyðugt at krevja grannskoðan eftir roknskaparstandardunum fyri at tryggja, at tað ikki aftur verða veitt ólóglig lán.

Til § 1, nr. 7 og 8

Talan er um fylgibroytingar orsakað av, at nýtt stk. 2 verður sett inn í § 135.

Til § 2
Skotið verður upp, at lógin kemur í gildi 1. januar 2016.
I stk. 2 verður skotið upp, at fyritøkurnar kunnu nýta ásetingina í § 1, nr. 3 í hesi lóg um grannskoðan eftir einum váttanarstandardi fyri roknskaparár, sum eru byrjað áðrenn 1. januar 2016. Tað merkir, at tað á fyrstkomandi regluliga aðalfundi, sum verður hildin eftir 1. januar 2016, kann takast avgerð um, at komandi ársroknskapur skal grannskoðast eftir váttanarstandardinum, hóast roknskapartíðarskeiðið fyri komandi ársroknskap er byrjað áðrenn 1. januar 2016.

Johan Dahl
landsstýrismaður

/ Bjørgfríð Ludvig

Skjøl:
1. Skriv frá Felagnum Føroyskir Grannskoðarar
2. Hoyringssvar frá Felagnum Føroyskir Grannskoðarar
3. Hoyringssvar frá Føroya Arbeiðsgevarafelag
4. Hoyringssvar frá Fíggjarmálaráðnum
5. Hoyringssvar frá TAKS
6. Hoyringssvar frá og Grannskoðaraeftirlitinum.